Mentanarkvøld aftur á skránni í Sjónleikarhúsinum

Aftur í summar verða mentanarkvøldini á skránni í Sjónleikarhúsinum. Hesi eru serliga ætlað ferðafólki, ið koma til landið. Seinastu árini hevur hetta tiltakið verið, og tað við góðari undirtøku frá ferðafólki, ið hava latið væl at. Hetta er ein møguleiki hjá teimum at gera sær eina mynd av føroyska skaldskapinum og somuleiðis at royna føroyskan mat.

Tað er Havnar Sjónleikarafelag, ið fer at framføra føroyskan skaldskap, gamlan sum nýggjan, bæði søgur, sagnir, sang, tónleik, sjónleik og skjaldur.

Úr Sjónleikarhúsinum frættist, at tey eru farin undir venjingarnar, og at fyrsta sýningin verður 22. juni, hin síðsta 31. august..

Eftir framførðsluna verður føroyskur matur á skránni, og trivið verður í eitt kvæði saman við gestunum.

Tað verða royndir sjónleikarar, ið fara at framføra og leikstjóri verður Egi Dam.

Framført verður nærum hvørt týskvøld millum 22. juni og 31. august, øll kvøldini kl 20.

Tað ber tó til, eftir avtalu við Havnar Sjónleikarafelag, at keypa sýningar aðrar dagar.

Eys

Spurningar um tubbak

Klipp spurnablaðið úr blaðnum. Skriva rætta svarið í spurnarblaðið, skriva navn og bústað og send spurnarblaðið til:

Fyribyrgingarráðið
Postsmoga 135
FO-110 Tórshavn

Spurnablaðið skal vera Fyribyrgingarráðnum í hendi í seinasta lagi 28. mai.

Hvør luttakari kann bara senda eitt spurnarblað til kappingina, og er aldursmarkið 18 ár. Drigið verður millum spurnarbløðini, ið eru rætt svarað, á Torginum í SMS á Altjóða Roykfría degnum, leygardagin 29. mai kl. 13.00.

Harumframt hava tey, ið vitja básin hjá Fyribyrgingarráðnum altjóða roykfría dagin, eisini møguleika fyri at luttaka í kappingini. Spurnarblød eru at fáa í básinum hjá Fyribyrgingarráðnum 29. mai í SMS, men tey mugu verða útfylt og leverað til kappingina í seinasta lagi kl. 12.30.

Fyrsta spurnarblaðið, ið verður drigið og sum er rætt svarað, vinnur eina vikuskiftisferð fyri tvey til Reykjavíkar ella Aberdeen og aftur við Atlantic Airways annar vinningur verður ein gáva frá Almanna - og heilsumálaráðnum og triði vinningur verður eitt gávukort á 1000 kr. frá SMS.

Fyribyrgingarráðið
www.fyribyrg.fo

Spurnarkapping

1. Hvussu eitrandi er nikotin:
   - _ A) als ikki eitrandi
   - _ B) elvir til magakrampa og stundum til, at magin túsnar upp
   - _ C) bara eitrandi, um tað er bundið saman við øðrum evnum í tubbaksvøru
   - _ D) lívshættisligt í stórum nøgdum
2. Hvussu nógv kostar tað at roykja 20 sigarettir um dagin í eitt ár? (35 kr. fyri 20 sigarettir)
   - _ A) 6.775 kr.
   - _ B) 9.775 kr.
   - _ C) 12.775 kr.
   - _ D) 15.775 kr
3. Hjá roykjarum kemur sinafelli (kynsligt máttloysi) av
   - _ A) at æðrarnar eru tiptar
   - _ B) minni blóð rennur út í kynslimin
   - _ C) blóðtrýstið í kynsliminum er lægri
   - _ D) alt, sum stendur omanfyri
4. Verða tubbaksavgjøld hækkað, hevur tað við sær:
   - _ A) at færri doyggja av royking
   - _ B) at fleiri gevast at roykja
   - _ C) at færri ungfólk fara at roykja
   - _ D) at færri av teimum, sum hava lagt av at roykja, fara at roykja aftur
   - _ E) alt, sum stendur omanfyri
   - _ F) bara B. og C. svar omanfyri
5. Í tubbaksroyki er:
   - _ A) kolsúrni (eiturgass, sum fer í blóðkyknurnar í staðin fyri súrevni - er lívshættisligt í stórum mongdum)
   - _ B) benzen
   - _ C) formaldehýd
   - _ D) hydrogen cyankalium
   - _ E) blýggj (eitrandi tungmetal)
   - _ F) Øll omanfyri nevndu evni
6. Reyðu blóðkropparnir bera súrevni út í líkam okkara. Kolsúrevni kemur í staðin fyri súrevni, táið vit roykja. Hvussu nógv minni av súrevni megna reyðu blóðkropparnir at bera?
   - _ A) 2%
   - _ B) 6%
   - _ C) 12%
   - _ D) 28%

Navn: _____

Bústaður: _____

Telefonumar: _____

Aldur: _____

Góða eydnu við svarunum!

Leif Sørensen, gourmetkokkur:

Nýggj, eksklusiv matstova í Havnini

Leif Sørensen, gourmetkokkur, sum hevur ætlanir um at lata eina matstovu upp í Havnini, hevur m.a. verið og hugt at hølunum hjá Valdemar Lützen. – Hølini eru perfekt til matstovu, men enn er eingin avtala gjørd, sigur hann

Nógvir møguleikar eru í hølunum, har handilin hjá Valdemar Lützen hevur hildið til í eitt mannaminni. Leif Sørensen, kokkur, sigur, at tey í øllum førum høvdu verið perfekt at havt matstovu í

NÝGGJ MATSTOVA
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Ein, ið í løtuni leitar eftir høli í Havn, er Leif Sørensen, kokkur, sum í seinastuni hevur verið at sæð í svf sendingini Cassiopeia. Hann hevur ætlanir um at lata upp eina matstovu í býnum, og Sosialurin hevur frætt, at hann hevur verið og hugt at hølunum hjá Valdemar Lützen.

– Ja, eg havi ringt til Valdemar Lützen fyri at frætta nærri um hasi hølini, eftirsum teir nú steingja. Men vit hava ikki gjørt nakra avtalu. Eg havi hugt at nógvum hølum, og hatta er so eitt av teimum. Tað sigur Leif Sørensen, sum tó ikki dylur, at júst hesi hølini eru serliga vælegnað til matstovuvirksemið.

– Um eg læt upp eina matstovu har, hevði eg satsað uppá at havt eina café líknandi matstovu, ið seldi góðan, men bíligan mat niðri undir, meðan eg hevði viljað havt eina dýrari og meira eksklusiva matstovu uppiá.

Spurdur um tað eftirhondini ikki eru nóg mikið av matstovum í Havnini, sigur hann, at tað heldur hann ikki.

– Eg haldi ikki, at støðið á føroysku matstovunum er serliga høgt, og eg haldi, at tað er tørvur á eini matstovu, ið leggur størri dent á støðið.

Catering virkið í søguna

Sum er, hevur Leif eitt catering virki. Fólk bíleggja mat frá honum til veitslur o.a., og hann koyrir so matin út. Hetta verður so nokk niðurlagt tá matstovan verður veruleiki.

– Eg ætli mær at taka øll tólini, sum eg nýti nú, við mær, tá eg latið matstovuna upp. Men eg fari ikki at nýta tey til at gera cateringmat í sama mun sum nú. Tá fari eg at hava matstovu og ikki catering, sigur hann.

– Um fólk fara at ringja til matstovuna og ynskja mat út av húsinum, so verður tað allarhelst møguligt, men tað verður altso matstovan, sum fer at fáa hægstu raðfesting, sigur Leif.

Leif vil enn ikki seta nakra dagfesting á, nær hann væntar at lata dyrnar á nýggju matstovuni upp, men sum skilst, verður arbeitt dúgliga fyri at fáa høli til vegar.

Áhugaverd framsýning um upphav Føroya

Í gjár læt ein nýggj framsýning upp í framsýningarhølunum hjá Náttúrugripasavninum. Á framsýningini ber til at síggja, hvussu Føroyar blivu til

ORÐ OG MYNDIR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað er sera áhugavert at ganga í framsýningarhølunum hjá Náttúrugripasavninum og hyggja eftir teimum mongu ymisku framsýningunum, ið har eru. Til ber at fáa fitt av kunnleika bæði um djóralívið í Føroyum, plantulívið og um føroysku jarð-frøðina. Nú er framsýningin so vorðin eitt sindur ríkari, av tí at nú ber eisini til at síggja í orðum og myndum, hvussu Føroyar blivu til.

Upphav Føroya

Á framsýningini verður greitt frá um 60 milliónir ára gomlu søguni hjá Føroyum. Til ber at síggja, hvussu hesir 18 klettarnir mitt úti í Norður-Atlantshavinum vórðu til. Talan er um eina ógvusliga søgu um eldgos, ístiðir og niðurbrótting av einum landi, sum upprunaliga var risastórt.

Lýst verður, hvussu Føroyar fóru frá at verða eitt risastórt øki landaøki við frumskógarvøkstri til at verða oyggjar við fjøllum, dølum og drangum.

Eisini er ein framsýning um føroysk steinsløg, har nøkur av teimum steinsløgum, ið finnast her á landi, verða víst. Nógvir av føroysku steinunum eru sjáldsama vakrir, og tú fært meiri at vita um tað, ið tú finnur úti í náttúruni.

Framsýningin, sum er í hølunum hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð, er opin gerandisdagar frá 10 til 16, og í vikuskiftinum frá 15 til 17. Skúlaflokkar og børn undir fermingaraldur hava ókeypis atgongd, og til ber hjá skúlaflokkum og øðrum bólkum at fáa skipaða rundvísing eftir avtalu.